## Sex-hungur



Ein nýggj kanning vísir, at danir halda sjokulátu, ostrur og reytt kjøt verða mest erotiska matin. Í botninum liggur svínakjøt, sum verður mett at vera keðiligur gerandiskostur.

Men stjørnukokkurin Henrik Boserup heldur kanningina verða nakað tvætl, tí allur matur kann vera erotiskur, um hann verður handfarin og etin við kærleika og er úr góðum rávørum. Sansaligur, romantiskur og erotiskur matur er eisini chili, hvítleykur, champagna, hunangur, skeljadjór og ingifer.




## Sús og djús

Í spildur-nýggju bókini "500 juicer og smoothies" finna vit eina perlurøð av leskiligum uppskriftum til dreymakendar drykkir av alskyns slag. Lat teg freista av einari heilsugóðari orkubumbu, einum mjúkum milkshake ella einum leskiligum smoothie á einari av teimum 288 litsíðunum. Bókin kostar umleið 120 krónur í bókabúðunum.

## Hoyrt í býnum...

Tey spyrja, hví so nógvar føroyskar kvinnur heldur vilja búgva í Danmark

– Heilt erligt, hvussu ringt kann tað vera? Har kann man grilla!

*Lagt til rættis: Rigmor Dam & Dorit Hansen*



# Etsy – har tú finnur tað heilt serliga

Men á netinum er eitt stað, har tú altíð kanst finna okkurt flott, frekt, festligt og hondgjørt. Etsy er sølutorgið hjá kreativum fólki um allan heim, ein marknaður, sum umfatar fleiri hundrað túsund regluligar kundar.

Heimasíðan, www.etsy.com, lat upp í juni 2005, og í juli 2007 var vøra nummar ein millión seld á heimasíðuni. Í løtuni eru á leið 170.000 ymiskir seljarar ella handlar á Etsy.

Her eru listafólk og listahand-verkarar av øllum handa slag, og skalt tú keypa okkurt heilt unikt og stuttligt, finnur tú tað uttan iva á etsy.

Á síðuni ber til at lesa meira um einstøku seljarnar, og hvussu aðrir kundar hava verið nøgdir við vørurnar hjá teimum. Her eru eingi millumlið millum seljara og keypara.

Ein kvinna í Kina situr og seymar eitt festligt fyriklæði, sum hon sjálv hevur sniðgivið. Síðani tekur hon eina mynd og leggur hana á Etsy, og nakrar dagar seinni kemur føroyska postboðið við pakkanum til tín.

### Festlig teldutaska



Í handlinum Ella Since Osix selur Ella úr Hollandi teldutaskur, sum hon hevur seymað um við vintage toyi. Sterkar taskur í festligum farvum

### Tøvdir steinar úr Hollandi



Tað ber eisini til at keypa steinar á etsy. Smáir steinar tøvdir inn í vakurt litaða ull. Reya Veltman úr Hollandi hevur nógvar spennandi tøvdar ullalutir í sínum bási

### Tín egna pung úr Japan



Ella hvat við einum snøggum pungi úr Japan. Sølutorgið, Little Cat, hevur nógvar vakrar lutir seymaðar úr toyi. Allir gjørdir við kærleika, sum seljarin í Tokyo sigur

### Avbjóðandi list



Tað ber eisini til at keypa fotomyndir, tekningar og málningar á Etsy. Hendan myndin er prent av oljumálningi hjá amerikansku listakvinnuni, Lisa Hurwitz